


*Umframt Vædderen hava vit nú eisini fingið Thetis í føroyskan [illegible]. Hesin skal tó gera seismiskar kanningar. Mynd jan*

*Hátíðardámur umborð á Thetis á móttøku á Sundi*

# Danskt sjóverjuskip skjýtur nú seismikk

*Í hesi vikuni legði danska sjóverjuskipið Thetis frá landi á Sundi. Leiðin gongur út á føroyska landgrunnin - ikki til at reka vaktartænastu men til at skjóta seismikk, sum skal hjálpa oljufeløgunum at loysa upp fyri loyndarmálunum, sum liggja goymd í føroysku undirgrundini. Tað er grønlendska oljufelagið Nunaoil, sum hevur leigað seismikkfelagnum Western Thetis til nakrar sera framkomnar seismikkanningar.*

Jan Müller

Nógv varð gjørt burtur úr umborð á danska sjóverjuskipinum Thetis, tá móttøka varð umborð fyri innbodnum, nú Thetis fyri fyrstu ferð skal til at gera seismiskar kanningar við Føroyar.

Thetis, sum í fleiri ár hevur gjørt seismiskar kanningar í Grønlandi fyri grønlendska oljufelagið Nunaoil, kom á Sund í farnu viku.

Leygardagin var so móttøka umborð, har m.a. løgmaður, landsstýrismenn, umboð fyri Oljufyrisitingina og pressuna o.o. vóru við.

Talan er um at gera eitt nýtt slag av seismiskum kanningum við Føroyar, og hetta kann bert gerast við tveimum skipum. Av tí at basaltið er so tjúkt er torført at síggja nóg væl niður undir basaltið. Fyri at kunna betra um dygdina av seismikkinum skal Thetis saman við einum av skipunum hjá Western Atlas, gera kanningar, har skipini sigla aftaná hvørjum øðrum. Hetta ger, at teinurin tú kanst taka ímóti ljóðbylgjunum verður so nógv longri, enn um bert eitt skip var brúkt.

Tað er amerikanska seismikkfelagið Western Geofysical, sum stendur fyri kanningini vegna fleiri oljufeløg og hevur leigað Thetis frá Nunaoil í eina tíð. Tað eru tey fýra oljufeløgini Amerada Hess, Dong, Norsk Hydro og Lasmo, sum hava biðið um at fáa hesa kanning gjørda.

Western Seismiska útgerðin umborð á Thetis kemur m.a. frá Western og brúka teir eisini fleiri Westernfólk umborð til tær seismisku uppgávurnar.

Undir móttøkuni umborð á Thetis seinasta leygardag greiddi Morten Larsen frá Nunaoil føroysku gestunum frá arbeiðsætlanini og høvi var eisini at síggja hetta snotuliga skipið.

Morten Larsen sigur við Sosialin, at teir eru sera fegnir um at vera komnir til Føroya við Thetis.

Hann heldur skipið er sera væl egnað til at gera slíkar kanningar og vónar, at okkurt gott fer at spyrjast burtur úr kanningunum.

Ætlanin er, at Thetis skal arbeiða einsamalt nú í nakrar dagar. Tá fer so Western Cove at koma til Føroya úr Noregi. Saman við Thetis fer Western Cove at skjóta



*Thetis við bryggju á Sundi. Nú verður tað annað slag av kanónum, sum verða brúktar, nevniliga luftkanónir. Mynd jan*

Harumframt skal Western eisini fyri egna rokning gera kanningar, sum skulu supplera kanningarnar fyritøkan gjørdi við Føroyar í 1994 og 95.

**Nunaoil leigar Thetis frá sjóverju**

Nunaoil, sum nú vitjar í Føroyum fyri fyrstu ferð, hevur leigað Thetis frá donsku sjóverjuni til kanningar í Grønlandi. Nú tá skipið mátti avlýsa eina av uppgávunum í leigutíðini, fekk Nunaoil samband við Western, sum fegið vildi brúka skipið í nýggju seismisku kanningini við Føroyar. Annars hevur Nunaoil rættiliga gott samstarv við

seismikk á einum stórum øki vestan og sunnan fyri Føroyar.

Morten Larsen sigur, at teir hjá Nunaoil eisini vóna at kunna fáa nakað av royndum her við Føroyar, sum teir sjálvir í longdini kunnu fáa brúk fyri í Grønlandi. Her verður serliga hugsað um royndirnar at skjóta nýggjan seismikk í basaltøki.

Nunaoil, sum er eitt grønlendskt/danskt oljufelag, hevur síðani tað byrjaði fyrst í 90-unum, havt tætt samstarv við donsku sjóverjuna. Thetis skjeyt seismikk fyri Nunaoil longu í 1991.

Tann samstarvsavtalan gekk fram til 1995 og varð síðani longd í fjør til endan av hesi øldini. Morten Larsen roknar við, at henda avtala fer at verða longd aftur. Fyribils gera teir avtalur



*Millum gestirnar til móttøkuna umborð á Thetis á Sundi leygardagin var eisini løgmaður Edmund Joensen, sum umsitur undirgrundarmál. Her er hann saman við Morten Larsen frá Nunaoil. Mynd jan*